




# Deyðsfellur á landi og sjógvi



Val X

ANNIKA OLSEN
Valevni Fólkafloksins

Langt er enn á mál at tryggja øllum føroyingum betur trygd á arbeiðsplássinum, í heiminum og í ferðslukervinum. Óansæð um talan er um bústað, arbeiðspláss, skúlar, vega- og tunnilskervi, flogvøllin, fjøllini, fiskiskip, ferðafólkskip, boripallar ella annað, so eigur trygdin at verða sett ovast á breddan, so tað er trygt hjá tí einstaka at búgva, arbeiða og ferðast í okkara landi og sjóøki.

**Bústaðarpolitikkur**
Tá talan er um bústaðarpolitikk er tað ongin sum spyr, um vit gera nokk fyri at tryggja okkara hús og íbúðir. Fleiri eldsbrunar hesi seinni árini hava prógvað, at bæði nýggj og gomul hús eru deyðsfellur, tá eldur kemur í. Nógvar familjur hava mist ein av teirra kæru, tí brunatrygdin ikki varð í lagi. Hetta má broytast og tað ongantíð ov skjótt. Krøvini til bústaðarbygging og ikki minst eftirlitið má herðast. Eftirlit má havast við, at framleiðsla og innflutningur av byggitilfari lýkur øll nútímans krøv til brunatrygd og rýmingarleiðir. Verandi bústaðar mugu kannast gjølla. Gamlar bleytar byggiplátur mugu skiftast út við nýggjar góðkendar plátur. Hetta kann t.d. verða gjørt yvir eitt fimm ára skeið, har landið letur studning til tey húski, sum enn hava bleytar plátur. Oftani er talan um gomul hús, sum kanska eisini skulu bjálvast. Harvið kunnu fleiri endamál røkkast undir einum. Húsini gerast tryggari og bjálvingin ger húsini bíligiari at hita upp, sum aftur tænur umhvørvinum og útlátinum av $CO_2$. Fólkaflokkurin fer at arbeiða fyri, at trygdin í egnum bústaði og almennum hølum kemur á breddan í kommunalum umsitingunum eins og á Brunaumsjón landsins.

**Arbeiðsumhvørvi**
Í Føroyum hava vit eina lóg um verju av arbeiðsumhvørvinum. Lógin er galdandi fyri arbeiðspláss á landi, serliga arbeiðspláss við fleiri enn 10 starvsfólkum, men ikki fyri okkara fiskimenn umborð á skipunum, sum samanlagt teljast fleiri 100 starvfólk. Lógin er heldur ikki galdandi fyri skúlarnar, sum hava fleiri 1000 næmingar. Ti seti eg spurnartekin við, um tíðin ikki er komin at endurskoða verandi lóggávu, so at øll starvsfólk, allir lærarar og næmingar fáa somu verju tá talan er um eitt forsvarligt arbeiðsumhvørvi? Hví skulu fiskimenn ikki tryggjast eina minstu hvíldartíð? Er verandi fiskidagaskipan viðvirkandi til, at vit ikki kunnu geva fiskimanninum betri arbeiðsumstøður, tá teir eru úti? Er inniluftin á øllum arbeiðsplássum og skúlum so góð, sum verandi lóg leggur upp til? Hetta eru alt viðurskifti, sum mugu kannast gjølliga, so politiska skipanin kann fáa eitt haldgott upplysingar- og avgerðargrundarlag, tá bøtast skal um arbeiðsumstøðurnar. Hava vit ikki ráð at gera neyðugar ábøtur, sum tryggja túsundtals føroyingum betur kor í teirra dagliga yrki, so eru vit av sonnum ein fátøk tjóð.

**Trygd og tilbúgving**
Trygd og tilbúgving á landi og sjógvi eru átrokandi aðalmál í einum og hvørjum framkomnum samfelagi. Sjúklingar á landi og sjógvi mugu tryggjast skjóta og góða læknahjálp, óansæð um tey búgva á útoyggj, í útjaðaranum ella eru umborð á skipum í føroyskum sjóøki. Neyðugt er at uppraðfesta sjúkraflutningin, bæði við bilum og tyrlum. Nógv umrøddi tyrlusáttmálin við Atlantic Airways má og skal endurskoðast, so sáttmálin kann nøkta tann tørv, sum samfelagið hevur á skjótum og tryggum sjúkraflutningi. Krøvini til tyrlumanning og sjúkrabilsmanning mugu herðast, so sjúklingurin longu undir flutninginum kann fáa eina so skjóta og góða hjálp sum gjørligt. Skjót og røtt hjálp kann verða munur á lív og deyð.

At liggja í streymloysi í tíma- og dagavís kostar milliónir í framleiðsuvirði, tað sama gera avbrot í samferðslukervinum. At útbyggja vega-, tunnils- og sjókervi við tí fyri eyga at betra um trygdina og tilbúgvingina hevur alstóran týdning fyri flestu føroyingar, einstaklingar sum virki.

Tilbúgvingartænastan fyri sjófólkið má betrast, bæði í mun til skaðar, havarí og ikki minst eld. Hetta krevur betur útbúgving av øllum tænastuveitarum innan tilbúgving, tað verið seg sløkkilið, bjargingarfeløg, Fiskiveiðieftirlitið, privat feløg og onnur, sum so ella so eiga ein leiklut í tilbúgvingini. Bjargingartól og útgerð má útvegast, so vit ikki skulu bíða í dagar eftir hjálp uttaneftir. Avleiðingarnar orsaka av bíðitíð kann lættliga kosta mannalív. Samstarv og venjingar ímillum hjálpandi eindirnar má raðfesta av øllum, tí í Føroyum eru at kalla allar eindir so lítlar, at ongin hevur nokk í sær sjálvum tá á stendur. At seta pening av til regluligar venjingar, betur útbúgving og bjargingartól eru neyðugar fortreytir fyri at hækka tænastustøðið í tilbúgvingini. Skattaborgarin hevur longu rindað fyri hesa sjálvsagdu tænastu umvegis skatt og mvg. Fólkaflokkurin er garantur fyri, at trygd og tilbúgving verða raðfest ovarlaga á komandi fíggjarlógum.

www.annikaolsen.net

# Trivnaður



Val X

ÓSKAR EIRIKSSON
Fólkaflokkurin

Tórshavnar Býráð skal hava æru og tøkk fyri, sum tann fyrsta her á landi, at hava góðkent og lagt av eitt øki, har ætlanin er at byggja ein golfvøll.

Hetta fyrsta stig kemur við vissu at merkja, at vit kunnu bjóða okkara borgarum eitt tilboð, har trivnaðurin altíð er settur í hásæti.

Eisini kemur, sum Poul Michelsen plagi at halla Havnina “The green Capital in the Blue Ocean “, at kunna bjóða sínum gestum eina uppliving, sum tey sakna í dag.

Hendan sakn merkja vit serliga nógv við tað, at ferðaskrivstovur og hotell næstan dagliga eru í sambandi við golffelagið, tí gestir spyrja eftir tí.

Vit hava í alt ov mong ár verið eftirbátar á hesum øki, so lat okkum nú gera alt, sum gerast kann, og stuðla bygging av golfvøllum á sama hátt sum øðrum ítróttargreinum, samstundis, sum vit tryggja, at góðskustigið verður í hæddini.

Hetta fer at skapa trivnað, bæði fyri borgarar landsins og gestir tess.

Kross við Fólkaflokkin. Her virka vit!

Les meira á www.folkaflokkurin.fo

# Útbúgvingartilboð til orðblind



Val X

SOFUS DEBES JOHANNESEN
Javnaðarflokkurin

Tað hevur alstóran týdning at fáa fleiri útbúgvingartilboð til vaksin!

Ein stutt vitjan á skúlanum við Áir, sum veitir útbúgvingartilboð til vaksin, gav mær eitt sindur av innliti í trupulleikan hjá orðblindum, sum eg als ikki hevði varðhugan av var so stórur í Føroyum.

Eg má siga, at tað er eitt fantastikt arbeiði, ið hesin skúlin við Áir ger, og hesum eiga vit at stuðla nógv meira enn longu verður gjørt. Bæði við at betra um hølisumstøðurnar og við at játta meira pening til skúlan, so hann fær møguleikan at hjálpa enn fleiri fólkum við teirra stóra trupulleika.

Tað var sera áhugavert at hoyra hesi ungu fólkini greiða frá, hvussu tey vóru komin gjøgnum 10 ár í fólkaskúlanum, har tey av umverðini vórðu mett at vera minni begávaði og tey at enda sjálvi hildu, at tey kundu onki læra.

Tað er ikki lætt at koma víðari, tá man hevur eitt so lágt sjávsvirði, men tey greiddu frá, at eftir at hava verið á skúlanum við Áir í fáar mánaðir kundu tey vísa á risa framstig, og tey arbeiða við góðum huga um at koma út av skúlanum við góðari útbúgving, ið kann nýtast at koma víðari í útbúgvingarskipanini ella í vinnulívinum.

Hetta letur seg gera við einum góðum skúla og ikki minst við góðum serlærarum, sum sýna stórt hegni.

Tað henda broytingar í fólkaskúlanum, har trupulleikin við orðblindni er komin meira í fokus, men har er neyðugt, at vit vísa skúlanum meira stuðul, so hesir næmingarnir fáa stuðul og hjálp beinan vegin, trupulleikin er staðfestur.

Men broytingar í fólkaskúlanum hjálpa ikki teimum, ið eru farin úr honum. Tí mega vit geva fleiri vaksnum orðblindum møguleika at koma á skúlabonk at fáa hjálp fyri sín trupulleika. Tað kann gerast bæði við at víðka tilboðið við Áir við dagskúla, men eisini við at veita tilboðið eftir arbeiðstíð á ymsum skúladeplum kring landið.

Fái eg nakra ávirkan eftir valið, fari eg at arbeiða aktivt við hesum trupulleika!

Atkvøði tí fyri Javnaðarflokkinum leygardagin.

# Við C ganga vælferð og umhvørvi lið um lið



Val X

ÓLUVA NICLASEN
Javnaðarflokkurin

Ríkt ódálkað umhvørvi, fjøltáttað djóra- og plantulív, skilvís umsiting av lendinum og nýtsla úr havinum. Alt avgerandi fortreytir fyri framhaldandi menning, vælferð og einum ríkum lívi.

Javnaðarflokkurin raðfestir umhvørvið ovarliga. At bíða er ikki longur ein møguleiki. Allir flokkar hava sett umhvørvið á valskránna, so tað verður sera torført hjá flokkunum at koma aftur um 4 ár og enn einaferð ikki at kunna vísa á munandi batar og framstig.

Javnaðarflokkurin vil, at Føroyar skulu vísa altjóða samhaldsfesti í umhvørvismálum, eitt nú staðfesta okkara luttøku í altjóða arbeiðinum at skerja koltvísúni útlát. Sjálvt um Føroyar ikki staðfestu Kyotosáttmálan á hesum sinni, so skulu vit arbeiða, sum um vit hava staðfest hann; tað er, at minka útlátið við 8 % í mun til 1990. Ítøkilig tiltøk mugu setast í verk, sum veruliga tryggja minni oljunýtslu í skipaflotanum, húsarhaldunum og hjá SEV. Krøv skulu setast til bjálving og orkunýtslu í bygningum. Avgjaldspolitikkur og umhvørviskrøv skulu hanga saman. Miðast skal eftir, at varandi orkukeldur verða settar í staðin fyri oljuna.

Oljudálking av havnum og firðum er gerandiskostur. Firðirnir rúma ríkt djóra- og plantulív og verða nýttir til stóra matvøruframleiðslu. Her má vend koma í. Herd revsing av dálkarum er eitt amboð at nýta í umhvørvisverndararbeiðinum.

Við Javnaðarflokkinum fær umhvørvið eina rødd.